Kristina Háfoss
Løgtingskvinna

**Munnligur fyrispurningur**

**til**

**Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

**viðvíkjandi nær samgongan ætlar at røkka einum sjálvberandi búskapi**

1. Nær ætlar samgongan at málið um ein sjálvberandi búskap – ið er óheftur at veitingum uttanlands – skal verða rokkið ?
2. Hevur landsstýrið fingið svar frá donsku stjórnini uppá umsóknina um hækking av ríkisveitingini, og um so er, hvat varð svarið ?
3. Er nøkur ítøkilig ætlan fyri, hvat hækkaða ríkisveitingin skal nýtast til ?
4. Kann hugsast at hildið verður áfram at hækka ríkisveitingina – meira enn við prístalinum – um undirtøka fæst fyri hesum frá donsku stjórnini ?
5. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at hallið, ið longu er omanfyri 500 mió. kr., ikki gerst enn størri nú ætlanin er, at lække skattainntøkurnar við 265 mió. kr. ?
6. Nær er ætlanin hjá landsstýrismanninum at yvirskot aftur skal vera á landsins fíggjarlóg og hvat høvuðsamboð er ætlanin at nýta til, at røkka hesum máli ?

**Viðmerkingar**

Í samgonguskjalinum er sett sum mál at Føroyar skulu hava ein sjálvberandi búskap. Hetta er eitt gott mál at seta sær.

Men samstundis verður umsókn send til donsku stjórnina um, at hækka ríkisveitingina við 1/3 - yvir 200 mió. kr. - og eisini skal landsins inntøkuskattur minkast við 265 mió. kr., samstundis sum landskassin í forvegin hevur hall á yvir 500 mió. kr.

Settir verða tí hesir spurningar.

Á Løgtingi, 28. november 2011

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna*